Lisbeth L. Petersen:

Eg eri sterkari enn eg helt

Árið 2001 hevur higartil verið eitt baldrut ár hjá nývaldu fólkatingskvinnuni Lisbeth L. Petersen. Eftir formansvalið í Sambandsflokkinum í mars mánaða varð hon vald til formann. Í summar misti hon lívsfelaga sín ígjøgnum 40 ár, og nú til fólkatingsvalið er hon vorðin fyrsti kvinnuligi føroyingur á fólkatingi. Hvussu hevur nývalda fólkatingskvinnan fingið sorgina og valstríðið at hanga saman?

SORG OG VALSTRÍÐ
Ingrid Bjarnastein

Valstríðið hjá Lisbeth L. Petersen hevur hesuferð verið merkt av øðrum enn plakatum og fjølmiðlum. Politiskt hevur hon havt somu umstøður, eins og øll onnur valevni, men reint persónligt hevur trýstið verið væl størri.

Í 40 ár vóru tey gift, Jákup og Lisbeth L. Petersen. Men fyri stuttari tíð síðan misti Lisbeth mann sín. Jákup doyði av krabbameini eftir stutta sjúkralegu. Eitt slíkt tap ávirkar sjálvsagt eitt menniskja persónligt, og í hesum føri møguliga eisini politiskt.

– Sjálvandi hevur hetta ávirkað meg og mítt valstríð, sigur Lisbeth L. Petersen, sum er fyrsta føroyska kvinnan á fólkatingi.

– Men tá tú verður settur í eina støðu sum hesa, uppdagar tú, at tú ofta fært styrki, sum tú ikki visti at tú hevði.

Ikki komin fyri seg enn

– Eg eri ikki rættiliga komin fyri meg enn, men tað hjálpir at eg nú ta seinastu tíðina havi havt annað at hugsa um. Tá ein er til arbeiðis merkir ein tað ikki so væl, men tað at koma heim til eitt tómt hús er altíð ringt.

Lisbeth varð gift ung við Jákupi, og saman eiga tey tvey børn. Tey fyrstu árini var hon nógv einsamøll, tí hann sigldi úti.

– At eg var so nógv einsamøll tá eg var ung, hevur eisini á ein ella annan hátt hjálpt mær nú. Tað hevur hjálpt mær við at verða sjálvstøðug og at taka mær av mær sjálvari. Eg hevði eitt heim at taka mær av, og noyddist tí at savna meg um arbeiðið, ið tað innibar.

Viðhvørt er tað komið fyri, at Jákup var burtur í 15 mánaðar uttan steðg, tí soleiðis var tað jú tá, og eisini vóru tey, Lisbeth og Jákup, samd um, at soleiðis skuldi tað verða. Til dømis var elsti sonur teirra átta mánaðar áðrenn pápin sá hann fyri fyrstu ferð.

Lisbeth arbeiddi ikki úti tey fyrstu árini hon og Jákup vóru gift, men hon hevði ymisk áhugamál við síðuna av, og harímillum var politikkur.

– Áhugin fyri politikki kom, tá eg var heilt ung. Eg arbeiddi eina tíð sum skrivari í flokkinum, og eisini gjørdi eg ymiskt nevndararbeiði.

Mamman nógv at siga

– Eg havi fingið hjálp og umsorgan frá familju og teimum nærmastu, og hjálpir tað sjálvsagt ógvuliga nógv, sigur Lisbeth.

– Eisini tað, at flokkurin og arbeiðsfelagar sum heild hava víst góðsemi hevur hjálpt. Harumframt havi eg eina gamla mammu, sum er 90 ára gomul. Hon hevur verið ein ótrúligur stuðul at havt. Hon hevur verið sjúk hetta seinasta árið, men hon hevur ment seg, og hon hevur hjálpt mær ógvuliga væl.

Lisbeth L. Petersen sigur, at tað at hon hevur mist mannin hevur ávirkað hana. Tað sosiala hevur altíð havt hennara áhuga, og nú hon hevur sæð heilsuverkið innanfrá, hevur Lisbeth ásannað, at har er nógv sum skal gerast og nógv er, ið als ikki er nóg gott.

– Eg helt, at eg visti nógv, men ikki so nógv. Tað er onki galið við starvsfólkunum í heilsuverkinum, tað er heilt vist, men nógv er, ið krevur ábøtur.

Ansar sær

Lisbeth býr nú einsamøll, og hevur bert ein hund afturat sær, sum familjan hjálpir henni við. Nú metir hon seg eisini til at vera leysari til at vera heimanifrá, enn tá maðurin lá sjúkur heima.

– Tað hevur víst seg, at eg eri sterkari enn eg helt, men eisini er týdningarmikið at ansa sær sjálvum. Mark er fyri, hvussu nógv ein klárar, men júst nú havi eg tað gott við mær sjálvari, sigur Lisbeth L. Petersen at enda.

FARPACK

Samráðast um Bygdaleiðir

Samráðingar eru í gongd millum Strandfaraskip Landsins og tey, sum hava boðið upp á rutukoyringina hjá Bygdaleiðum

SAMFERÐSLA
Edvard Joensen

Avgjørt verður helst í næstu viku, hvør fer at reka Bygdaleiðir komandi fimm árini

Realitetssamráðingar fara í gongd í næstu viku millum Strandfaraskip Landsins og tey, sum ætla at røkja Bygdaleiðir komandi fimm árini.

Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari á Strandfaraskipum Landsins, sigur, at seinastu dagarnar hava verið fundir við tey, sum hava latið tilboð inn upp á koyringina. Einir 12 slíkir avklárandi fundir hava verið, sigur hann.

Okkurt tilboð var soleiðis, at tað líkasum datt burtur ímillum, men tey, sum hildið varð vóru á eini leið, vórðu eftirhugd, og tosað varð við tilboðsgevararnar fyri at fáa ymisk ting upp á pláss, sigur Poul Jákup Thomsen.

– Tað er umráðandi at tryggja sær, at báðir partar skilja hvønn annan og vita, hvat vit tosa um, áðrenn farið verður í realitetssamráðingar um koyringina, sigur hann.

Tað er settur ein bólkur á Strandferðsluni at taka sær av hesum samráðingunum. Har eru millum onnur roknskaparfólk og leiðslupersónar í, sigur Poul Jákup Thomsen.

Fyrst í næstu viku væntar hann, at farið verður undir tær endaligu samráðingarnar við tey, sum fara at fáa koyringina. Tá hava tey á Strandferðsluni hugt tilfarið ígjøgnum einaferð enn, og mett um, hvønn tey halda vert er at tosa við aftur. Tá so alt er endaliga avklárað, verða sáttmálar skrivaðir at galda fyri komandi fimm árini.

Poul Jákup Thomsen vil ikki siga nakað nærri um, hvønn tey fara at tosa við. Men hann sigur tó, at tað gleðiliga er, at nógv kend andlit fara at ganga aftur, tá Bygdaleiðir verða privatiseraðar eftir nýggjár.

Um Skálafjarðarleiðina, sum eisini er boðin út, sigur hann, at har verður støða tikin fyrsta dagin.

Sjálvstýrisflokkurin ger upp

Sjálvstýrisflokkurin skuldi seinnapartin í gjár á fund, har úrslitið og støðan eftir fólkatingsvalið skuldi viðgerast

EFTIRMETING
Edvard Joensen

Vanlukkuliga valúrslitið hjá Sjálvstýrisflokkinum skuldi til viðgerðar á fundi seinnapartin í gjár. Fundurin varð hildin eftir, at Sosialurin var farin til prentingar.

Edvard Hermansen, landsnevndarformaður í Sjálvstýrisflokkinum sigur, at fundurin skuldi gera eftirmetingar eftir hetta »lortavalið«, sum hann tekur til, ið flokkurin hevði týsdagin. Í aðrar mátar er ikki so nógv at siga um, hvat viðgjørt verður, segði hann.

Um grundina til valúrslitið sigur Edvard Hermansen, at eftir hansara tykki, var tað rumblið um formansvalið fyri stuttum, sum sást aftur.

– Tað var púra ørt í høvdinum at hava eitt formansskifti so stutt undan einum vali, sigur hann.

Sámal Petur í Grund og Edvard Hermansen hava saman við restini av floksleiðsluni viðgjørt vanlukkuliga valúrslitið

Har ljós brenna fá

Lítið var til frammanundan, og tá so summi rýma aðrastaðni ella sita heima, er skjótt at merkja mun, ásannar Edvard Hermansen.

Hann vísir á, at úti í Fugloy var afturgongd, sum hann tilskrivar einum ávísum navnnevndum limi, sum farin er hiðani av fold.

– So lítið skal til, at á einum lítlum plássi skal bara ein atkvøða til at ávirka prosentpartin munandi, sigur Edvard Hermansen.

»Har ljós brenna fá undir lágari lon, sæst gjølla, tá eitt teirra slóknar. Tá maður verður til fúkandi fon, hitt fámenta liðið hoknar«, yrkti Janus Djurhuus. Og sjálvdan man tað hava passað betri enn í hesum førinum.

Edvard Hermansen metir tó, at størri parturin av teimum atkvøðunum, sum ikki komu aftur í mun til seinasta val, eru slíkar, sum als ikki hava verið á vali.

Nakrar eru ivaleyst farnar aðrastaðani, tí fólk eru ikki so floksbundin í dag, sum vanligt var fyrr. Men at Sambandsflokkurin skal hava svølgt Sjálvstýrisflokkin soleiðis, metir hann ikki.

Edvard Hermansen heldur, at tað heldur munnu vera fólkafloksatkvøður, sum farnar eru til Sambandsflokkin fyri líkasum at byrgja eitt sindur upp fyri fullveldisrákinum hjá Tjóðveldisflokkinum.

Og tað heldur hann vera eitt ræðandi rák, tá nú samgongan hevur ein skipaðan fullveldispolitikk. Men ein sannroynd er, sambært Edvardi Hermansen, at partar av Fólkaflokkinum eru als ikki so fullveldissinnaðir, sum stevnan annars er til.

Sjálvgjørt

Heldur ikki Sámal Petur í Grund, formaður í Sjálvstýrisflokkinum ivast í, at úrslitið var sjálvgjørt.

Hann ásannar, at tað var óhepið at formansskiftið og fólkatingsvalið komu at liggja so nær hvørjum øðrum.

– Men vit vistu ikki, tá formansvalið var, at hetta valið fór at koma nú. Tað var væntandi seinni.

Hann sigur undan eftirmetingarfundinum í Sjálvstýrisflokkinum, at hann ætlar sær ikki beinanveg at leggja frá sær. Formaðurin kann bara veljast á aðalfundi, og hann verður ikki fyrr enn um eitt ár. Og Sámal Petur í Grund sigur, at hann hevur einki frætt um, at nøkur ætlan er um at trýsta hann til at fara frá.

Hann sigur, at væntandi var alla tíðina, at Sjálvstýrisflokkurin fór at fáa eitt vánaligt fólkatingsval.

Havandi 1998 valið í huga, kundi tað statistiskt bara ganga niðureftir. Men so vánaligt hevði hann kortini ikki væntað, sigur hann.

Sámal Petur í Grund sigur, at hetta valið kann als ikki samanberast við eitt løgtingsval, og hann ivast ikki í, at komandi løgtingsval verður nógv betri hjá Sjálvstýrisflokkinum.

Nær tað kann væntast at verða, vil hann ikki siga nakað um. Samgongan kom ikki so væl sum ætlað burtur úr fólkatingsvalinum og hevur tí helst ongar ætlanir um løgtingsval í ótíð. Men stutt er eftir av skeiðnum, og val skal haldast í seinasta lagi 30. apríl.

Tann dagin hevur løgmaður fyrr nevnt, og Sámal Petur í Grund, visir á, at 30. apríl 2002 er týsdagur, sum er vanligur valdagur.